# Álit

# í

**løgtingsmáli nr.  172/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)** (Leigubilar)

Ruth Vang, løgtingsmaður, hevur lagt málið fram 7. mars 2019, og eftir 1. viðgerð 27. mars 2019 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4. apríl 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Fíggjarnevndin metir ikki, at lógaruppskotið nóg greitt ásetir, at eisini teir kostnaðarmiklu leigubilarnir kunnu fáa endurrindað upp til 45.000 kr. í meirvirðisgjaldi.

Til tess, at ongin ivi skal vera um hetta, verður mælt til at broyta § 1.

Nevndin setir tí fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. Í § 1 verður § 10, stk. 2 orðað soleiðis:
   *“Stk. 2.* Fyri motorakfør, skrásett sum leiguakfør, skal akfarið antin hava havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hava koyrt í minsta lagi 12.500 km og hava verið skrásett sum leiguakfar í minsta lagi 6 mánaðir, ella hava verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár. Við sølu av leiguakfari kann frádrátturin í mesta lagi vera 45.000 kr. í útgangandi avgjaldinum fyri hvørt leiguakfar. Fyri motorakfør, nýtt til skúlakoyring, kann reglan í stk. 1 verða nýtt um so er, at akfarið hevur verið nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir.”

Við hesum broytingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 9. apríl 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Steig Nielsen<br>formaður | Ruth Vang<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |